Álit

í

løgtingsmáli nr. 29/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barsilsskipan (Barsilslógin) (Hækkan av hámarksupphædd)

Beinir Johannesen, vegna Fólkaflokkin, Magnus Rasmussen, vegna Sambandsflokkin og Steffan Klein Poulsen, vegna Miðflokkin, hava lagt málið fram tann 29. september 2023, og eftir 1. viðgerð tann 17. oktober 2023 er tað beint Rættarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 24. oktober, 7. og 14. november 2023.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við umboð fyri Akademikarafelag Føroya, Føroya Arbeiðsgevarafelag, Javnstøðunevndina og Ingilín D. Strøm, landsstýriskvinnu í umhvørvismálum saman við Barsilsskipanini.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Hervør Pálsdóttir, Kristianna Winther Poulsen, Kim Durhuus og Henrik Old) hevur hesar viðmerkingar:

Sambært uppskotinum eru meirútreiðslurnar av at hækka hámarksútgjaldið við 3000 kr. mettar til 5,7 mió. kr. Í hesa meting er endurgjald til arbeiðsgevarar tó ikki tikið við, og tí er metti kostnaðurin av uppskotinum sambært tølum frá Barsilsskipanini 8,3 mió. kr. Skuldi hækkingin av hámarksútgjaldinum verið fíggjað við hægri inngjaldi, hevði tað snúð seg um eina hækking uppá 0,04% uppí 0,9% av A-inntøkuni.

Hóast meirilutin heldur, at hámarksupphæddin eigur at verða hækkað, er meirilutin samstundis av teirri áskoðan, at hetta eigur at verða viðgjørt í sambandi við eina heildarviðgerð av skipanini, har eisini aðrir tættir verða tiknir við. Harafturat heimilar barsilslógin longu at hækka hámarkið við støði í lønargongdini í samfelagnum, og tí er ikki neyðugt við lógarbroyting.

Barsilsskipanin, sum kom í gildi í 2001, og sum er broytt fleiri ferðir síðani, er ein hin besta almenna barsilsskipanin í heiminum. Málið um at leingja rættin til barsilspening úr 48 vikum til 52 vikur eftir barnsburð er rokkið, men tað eru eyðsæð fleiri neyðugar broytingar eftir at fremja.

Sambært samgonguskjalinum frá 22. desember 2022 skal barsilsskipanin broytast til eina smidligari skipan, har til ber hjá foreldrum at leggja barsilstíðina til rættis eftir egnum ynski og tørvi. Landsstýriskvinnan hevur boðað frá, at ætlanin er at endurskoða skipanina í síni heild saman við pørtunum á arbeiðsmarknaðinum við tí endamáli at gera skipanina smidligari og meira hóskandi til dagsins samfelag, arbeiðsmarknað og familjulív.

Við hesum viðmerkingum tekur meirilutin ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Helgi Abrahamsen, Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur og Steffan Klein Poulsen) hevur hesar viðmerkingar:

Tað er eingin ivi um, at eitt gjald, sum hevur verið óbroytt í krónutali síðani 2004, er minkað nógv í virði. Tí er rætt, um málið er at varðveita sama virðið, at vit bæði vinna tað mista innaftur, og harumframt seta eina javning inn. Harvið er ikki sagt, at virðið, ið varð valt í 2004, er tað einasta rætta. Tað kundi til dømis eisini verið hægri.

Í mars 2022 legði tann eini samgonguflokkurin (Framsókn) uppskot fyri Løgtingið um at hámarksupphæddin í útgjaldinum skuldi prístalsjavnast (løgtingsmál 124/2021). Í álitinum frá Vinnunevndini sæst, at hinir báðir samgonguflokkarnir tóku undir við, at útgjaldið skuldi stigvíst hækka, men hildið varð ikki, at løtan tá var tann rætta, tí at fíggjarliga orkan í Barsilsgrunninum gav ikki møguleika fyri tí.

Nú hevur Rættarnevndin fingið upplýst, at næstan 37 mió. krónur vóru í Barsilsgrunninum í september í ár. Til samanberingar kann nevnast, at tá verandi samgonguflokkar í 2018 longdu barsilstíðina (løgtingsmál 98/2018), segði ein meting, at ognin í grunninum fór at verða 17 mió. krónur ultimo 2018. Sostatt er grunnurin nógv betur bjálvaður nú, enn hann var, tá samgonguflokkarnir seinast øktu um útgjaldið.

Tað undrar minnilutan, at meirilutin í Rættarnevndini grundgevur ímóti hesum uppskotinum við at vísa á, at vit eiga at gera eina heildarmeting av skipanini heldur enn at gera einstakar tillagingar. Hetta samsvarar ikki við tann veruleika, at allir tríggir samgonguflokkarnir í farna valskeiði høvdu hvør sítt uppskot um at gera smáar tillagingar í barsilsskipanini.

Landsstýriskvinnan hevur upplýst, at ætlanin er at endurskoða skipanina í síni heild saman við pørtunum á arbeiðsmarknaðinum, men enn er einki frætt um, at nakað arbeiði er farið í gongd tí víðvíkjandi.

Vit kunnu tí staðfesta, at samgonguflokkarnir hava sagt seg vilja hækka hámarkið fyri útgjaldi úr barsilsskipanini, men at bíðast skuldi eftir, at Barsilsgrunnurin var betur fyri fíggjarliga. Men hóast skipanin nú er væl fyri fíggjarliga, so skal nú bíðast eftir einum arbeiði, sum ikki er farið í gongd.

Við hesum viðmerkingunum tekur minnilurin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Rættarnevndin, 21. november 2023

Hervør Pálsdóttir forkvinna	Helgi Abrahamsen næstformaður	Kristianna W. Poulsen
Henrik Old	Kim Durhuus	Steffan Klein Poulsen

Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur